# KRABBABØKUR

Gerist haldari av krabbarøðini hjá
Bókadeild Føroya Lærarafelags
og Føroya Skúlabókagrunni
fyri serprís









Endamálið við krabbabókunum er:

1. at stimbra lesingina hjá barninum, sum er í ferð við at læra at lesa
2. at stimbra lesingina hjá barninum, sum nýliga hevur lært at lesa
3. at stimbra lesingina hjá barninum, sum hevur ilt við at lesa
4. at kveikja lesihugin hjá barninum, sum ikki tímir so væl at lesa

Haldaraskipanin, sum er vegleiðandi, er lagað til næmingatalið í skúlunum:

**1-40 næmingar:** haldaraskipan lagað til tørvin hjá skúlanum

**40-50 næmingar:** ein kassi

**50-70 næmingar:** ein kassi (8 eintøk av hvørjari bók)

**70-110 næmingar:** tveir kassar

**110-140 næmingar:** tríggir kassar

**140 og fleiri næmingar:** fýra kassar



Í hvørjum kassa eru 35 bøkur (7 ymiskar bøkur, 5 av hvørjari). Fyri hvørjar 35 bøkur, skúlin keypir, fær hann ein kassa, sum er gjørdur til krabbabøkurnar, klistrimerki við krabbunum at seta á kassarnar og nýggj bókamerki. Til ber eisini at keypa eyka kassar á kr. 300 hvør.

**PRÍSDØMI FYRI EIN KRABBABÓKAKASSA:**

2 bøkur á kr. 58, 2 bøkur á kr. 75, 2 bøkur á kr. 90 og 1 bók á kr. 95
5 av hvørjari, samanlagt 2.705 kr. Avsláttur á 10 prosent kr. 2.434,50
4 útgávuumfør um árið – samanlagt kr. 9.738 um árið
(Hetta er eitt vegleiðandi prísdømi)

Bókamiðsølan umsitur haldaraskipanina.
Setið tykkum í samband við okkum á **tlf. 317644/213293**
ella skrivið til **Gitte Klein, marknaðarfólk, á gitte@bfl.fo**

Kunnið tykkum við allar krabbabøkurnar og um annað í hesum sambandi á krabbastevnuni á FirstClass.

Í 2008 eru 20 bøkur komnar út í krabbarøðini

2. torleikastig: 8 bøkur




3. torleikastig: 6 bøkur




4. torleikastig: 5 bøkur




5. torleikastig: 1 bók




Tvær av bókunum eru fakbøkur, **Snýs, njós, histi og hosti** og **Blinkstra, blunka, venda og snara**.

Bókin **Leið meg, Samira** varð heiðrað í november við Skrivaraprísinum, ið danska kenslumálaráðið letur.

Krabbabøkurnar eru spennandi og stuttligar søgur, ræðusøgur, søgur um vinalag, happing og kærleika. Eisini eru søgur um lívsins stóru spurningar í barnahædd.

Í 2009 økja vit útgávutalið til 25 bøkur; 6 koma í mars, 7 í mai, 7 í september og 6 í november. Tær fyrstu upprunaføroysku bøkurnar í krabbarøðini koma út í september í ár. Í fyrsta umfari verður talan um 4 bøkur, og tær eru allar til 1. torleikastig. Fittar og spennandi bøkur til allarfyrstu lesingina.

Sera væl umtókta røðin Koldt blod eftir Jørn Jensen kemur í føroyskari týðing; fyribils eru 15 bøkur, tær fyrstu 5 koma á føroyskum í 2009.

Allar bøkurnar eru lesifrøðiliga viðgjørdar.

Uppgávur verða gjørdar til bøkurnar frá 1. til og við 4. torleikastig. Tær verða lagdar út á krabbastevnuna á FirstClass og eru eitt ókeypis tilboð til skúlarnar.

# Krabbabøkurnar eru býttar upp í 7 torleikastig:

 vegleiðandi til 1. flokk

 vegleiðandi til seinnu helvt av 1. flokki og 2. flokk

 vegleiðandi til 2. og 3. flokk

 vegleiðandi til 4. flokk

 vegleiðandi til 4. og 5. flokk

 vegleiðandi til 6. og 7. flokk

 vegleiðandi til 8. flokk og eldri næmingar

Við at gerast haldari av krabbabókunum ogna tit tykkum sera góðar bøkur til børn og ung. Bøkurnar eru valdar út millum tær bestu lættlisnu bøkurnar, ið eru komnar út í grannalondum okkara.
















## Barnabókin letur hurðar upp til bókmentirnar – eina endaleysa verð, sum gongur gjøgnum alt lívið.

FØROYAPRENT